STUDNI
Student Grant Fund

Vegleiðing til stuðulsskipanina
Málslig fyrireikingarskeið

Henda skipanin veitir stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar í ikki enskt-talandi londum, tó ikki til danskt, norskt og svenskt, og er ætlað teimum, ið hava ætlanir um at lesa hægri lestur í hesum londum. Gjørt verður vart við, at málskeiðini skulu vera á høvuðsmálinum ella á einum av høvuðsmálunum í landinum, tó ikki á enskum. Hægri lesturin kann lutvíst ella heilt fara fram á enskum í tí ikki enskt-talandi landinum.

Krøv til málsligu fyrireikingarskeiðini:

- Skeiðini skulu vera tikin í sambandi við hægri lestur.
- Skeiðini skulu vera fulltíðarskeið við í minsta lagi 15 tímum um vikuna.
- Skeiðini skulu eisini góðkennast av Studna.

Á hvønn hátt verður stuðulin veittur og hvussu leingi?

- Stuðulin verður <u>í fyrstu atløgu</u> veittur sum lán til skúlagjald og lán til livikostnað eftir fylgjandi reglum:
- Til skúlagjaldið verður veitt lán, tó í mesta lagi kr. 20.000. Skúlagjaldið umfatar bert útreiðslur, ið hava beinleiðis við lesturin at gera.
- Til livikostnað verður veitt lán. Lánsupphæddin, ið verður veitt hvønn mánað, er mánaðarliga studningsupphæddin, sum til eina og hvørja tíð verður veitt til hægri lestur í Føroyum – skúlaárið 2023/2024 er henda upphædd kr. 4.960.
- Stuðulin verður í mesta lagi veittur í 6 mánaðir.
- Er talan um heilt fremmant mál, kann stuðul veitast í upp til 1 ár.

Stuðul kann eisini veitast til málsligt fyrireikingarskeið áðrenn útbúgvingin byrjar, miðskeiðis ella beint eftir lokna útbúgving, tó í seinasta lagi 1 ár eftir, at útbúgvingin er lokin.

Í hvørjum førum og hvussu verða lánini umløgd til studning?

Um tann lesandi, innan 15 mánaðir eftir at málsliga fyrireikingarskeiðið er endað, fer undir hægri lestur á lærustovni í landi, har høvuðsmálið er tað sama, sum tað var á málsliga fyrireikingarskeiðnum, verða lánini umløgd til studning. Umleggingin verður framd, eftir at tann lesandi hevur tikið royndirnar til fyrsta lestrarári á lærustovninum.
Um málsliga fyrireikingarskeiðið er undir lestrinum, verður umleggingin frá láni til studning framd, eftir at tann lesandi hevur skjalprógv frá lestrarstaði um lestrarvirkni og váttan fyri lokið málskeið.
Um málsliga fyrireikingarskeiðið er eftir lokna útbúgving, verður umleggingin frá láni til studning framd, eftir at tann lesandi hevur skjalprógv fyri lokna útbúgving og váttan fyri lokið málskeið.

Umsóknarmannagongd:

- Nær skal søkjast? Søkjast skal helst, áðrenn farið verður á málsliga fyrireikingarskeiðið. Umsóknarfreistin er tó úti, tá skeiðið endar.
- Umsóknarblaðið ”Umsóknarblað til málsligt fyrireikingarskeið”, ið fæst á heimasíðuni www.studni.fo, verður saman við skjalprógvum sent Studna (sí tvey tey fyrstu punktini í “Krøv til málsligu fyrireikingarskeiðini“)
- Um umsóknin verður játtað, fært tú saman við játtanarskrivinum eitt skuldarbræv við eini upphædd, sum svarar til kostnaðin, ið Studni veitir í láni til skúlagjaldið og láni til livikostnað. Tað er henda upphædd, ið seinni kann verða umløgd til studning.
- Í fyrsta umfari rindar tann lesandi skúlagjaldið.
- Skúlagjaldsparturin verður endurgoldin, tá skuldarbrævið og kvittanin fyri at skúlagjaldið er goldið, eru Studna í hendi.
- Livikostnaðarparturin verður útgoldin mánaðarliga.